**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið*
*Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International Føroya Deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 9.00 til 17.00 og mikudag frá kl. 9.00 til 16.00
Heimasíða: www.amnesty.fo
Teldupostur: amnesty@amnesty.fo

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18. LFÚ ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16 til 18.
Tinghúsvegur 18, 3. hædd, Tórshavn.
Tel. 310220 (skrivstovan)
tel. 315015 (ráðgevingin).
Teldupostur:
lfu@post.olivant.fo
Heimasíða: www.lfu.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624.
Teldupostur: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er mánadag-hósdag kl. 10.00-15.00.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum.
Formaður: Hilmar Joensen.
Dagligur leiðari: Malan Matras Joensen.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.

# Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit tykkum mongu, sum gleddu okkum á brúnabandsdegnum 25. juni. Ein serlig tøkk fer til tykkum, sum hjálptu til at fyreika.*
***Heilsan Eydna og Ronnie Samuelsen***



*Hjartans tøkk til øll, sum vóru við til at gera brúnabandsdag okkara tann 27. mai 2006 ógloymandi. Takk fyri uppringingar, fjarrit og gávur. Og hjartans tøkk til tykkum øll, sum hjálptu okkum.*
***Kærar heilsanir Edith, Bergur***
***Tóki og Tóra Kristina Joensen***


STARVSLÝSING

## Handverkari

**Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi handverkara til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja skjótast gjørligt eftir 21.august 2006. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.**

sansir.fo

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum entreprenørmaskinsmiður, maskinsmiður, bilsmiður, lastbilasmiður ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum ímillum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til

Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 16.august 2006.

Merkið brævbjálvan ”Umsókn handverkari”.
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson rakstrarleiðara, á tlf. 540 950 ella Jóhan Hansen smiðjumeistara, á tlf. 540 951.

**Landsverk** er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.

Landsverk, Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78, Tórshavn

Tel 340 800, Faks 340 801
lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK
byggir land





# Starvsfólk til KT-deildina

Søkt verður eftir starvsfólki til KT-deildina hjá Atlantic Airways.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
- Menning av skipanum og mannagongdum
- Viðlíkahald av netinum, skráum og kervinum o.a.
- Upplæring, vegleiðing og skipan av skeiðum fyri brúkarum
- Fyrireika innkeyp av telduútbúnaði og aðrari skristovuútgerð

**Krøv**
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin:
- hevur hollan praktiskan kunnleika umframt útbúgving innan økið
- hevur evni at samstarva og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- kann arbeiða undir trýsti

Vit bjóða eitt áhugavert starv við stórum og fjølbroyttum avbjóðingum og møguleika fyri fakligari og persónligari menning í einum góðum og dynamiskum umhvørvi.

Nýggja kt-starvsfólkið skal setast skjótast gjørligt, og setanartreytir verða avtalaðar nærri við setan.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. august 2006. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Reidar Ole-Jacobsen, KT-leiðara, á tlf. 34 10 00 ella e-mail: reidar@atlantic.fo.

Umsóknin skal sendast til:
Atlantic Airways, Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, Vága floghavn, 380 Sørvágur

www.sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 180 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 378 milliónir krónur í 2005. Atlantic Airways hevur seks flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingar-tyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum | www.flyfaroe.com